## Meiri enn helvtin verða fødd uttanfyri hjúnarlag

Í àrsfrágreiðingini frá Landslæknanum sæst, at tað vóru 709 børn fødd í 2003. Harav vóru 708 fødd livandi, meðan eitt var deyðføtt.

Av øllum 709 børnunum vísir frágreiðingin, at heili 57,7 % av børnunum, tvs nakað væl meiri enn helvtin, vórðu fødd uttanfyri hjúnarlagið. Í 1994 varð talið 44, 6 %, og tað er so at siga vaksið støðugt inntil í dag.

706 av teimum 709 børnunum fødd í 2003, vóru fødd á sjúkrahúsið. Síðani 1994 er bara eitt ár, har øll børnini í einum ári eru fødd á sjúkrahúsi, og tað var í 1995. Hini árini hevur talið tó ligið omanfyri 99%.

## Nógvir nýføðingar doyggja í Grønlandi

Tølini fyri pinkubarnadeyða í Grønlandi eru óvanliga høg í mun til hini norðanlondini. Bæði hvat viðvíkur deyðføddum, og hvat viðvíkur børnum, ið doyggja innan fyrstu liviviku.

Taka við tíðarskeiðið 1996-2000, síggja vit, at meðan talið fyri børn, ið doyðu innan fyrstu vikuna í Føroyum var 1.2, vóru tað í Grønlandi heili 11.3 børn, ið ikki livdu longri enn fyrstu vikuna.

Eisini hvat tølunum fyri pinkubørn deyð innan fyrsta árið viðvíkur, eru grønlendsku tølini nakað væl hægri enn í hinum londunum. Í tíðarskeiðnum 1996-2000 var føroyska talið 1.8, meðan tað grønlendska var heilt uppi á 16.8. Landið, sum hevði næsthægstu tølini var Noreg, ið hevði 4.1 børn, ið ikki livdu fyrsta árið á tamb.

## Vit liva longri og longri

Bert síðani 1986 er væntaða livitíðin í Norðurlondum longd munandi. Stóri munurin, ið altíð hevur verið ímillum longdina á konufólkalívum og mannfólkalívum, tykist nú minka. Kvinnurnar hava enn munin og kunnu vænta at liva longri enn menninir, men væntaða livitíðin hjá mannfólki leingist meiri enn hon ger hjá konufólkunum.

Tølini frá landslæknanum siga, at dreingir, ið vóru føddir ímillum 1986-1990 kunnu vænta at liva 72.8 ár. Genturnar føddar í hesum tíðarskeiði kunnu vænta at liva 79.6 ár.

Men uppá bert 14 ár er væntaða livitíðin økt munandi. Hjá børnum fødd í 1996-2000 er væntaða livitíðin 75.2 ár fyri dreingir og 81.4 ár fyri gentur. T.v.s., at í tey fjúrtan árini frá 1986 til 2000 eru dreingjalívini longd 2.4 ár og gentulívini 1.8 ár. Konufólkini hava sostatt enn munin, men spurningurin er, hvussu long tíð man fara at ganga, áðrenn tað verður púra javnt.

Gongdin er hin sama í nærum øllum Norðurlondum, men enn einaferð haltar Grønland aftanfyri saman við Álandi.

## Grønland fylgir ikki við

Har føroyskir dreingir kunnu vænta at liva 75.2 ár, kunnu grønlendskir dreingir ikki vænta sær meiri enn 62.8 ár, heili 12.4 ár færri. Hjá gentunum er væntaði føroyski livialdurin 81.4 ár, meðan hann í Grønlandi bert er 68 ár. Føroysku genturnar kunnu sostatt vænta sær at liva heili 13.4 ár longri enn tær grønlendsku. Tað má sigast at vera ein sera stórur munur. Landið, ið hevur stytst væntaða livitíð, um vit ikki taka Grønland við, er Danmark. Har er væntaða livitíðin fyri dreingir 74.3 ár fyri dreingir og 79.0 fyri gentur. Tað er lítið minni enn Føroyar, og væl meiri enn Grønland. Í Grønlendsku tølunum sæst enntá, at ætlaði livialdurin hjá konufólkinum minkar. Síðani 1986 er hann farin frá 68.4 til 68.0.

Eitt annað land, ið ikki fylgir rákinum í hinum Norðanlondunum, er Áland. Har vísir tað seg nevniliga, at tølini fyri ætlaða livialdurin hjá bæði konufólki og mannfólki eru minkandi. Áland hevur tó síðan 1986 havt nógv tey hægstu tølini, so hóast væntaða livitíðin er follin frá 1986 til 2000, so er Áland framvegis ímillum tey lond, har íbúgvarnir kunnu vænta sær at liva longst.

**eys**



*Føroyska summarið er ikki nóg freistandi fyri ein stóran part av føroyingunum. Teir vilja sleppa at ferðast uttanlands, og í ár er Bulgaria heitasta ferðamálið fyri charter túrar*

# Bulgaria er heitasta ferðamálið

**Bæði á Faroe Travel í Havn og á Fonn flog í Klaksvík, siga tey, at tað, hóast byrjandi lágkonjunkturin, eru støðugt fleiri fólk, ið ferðast. Nógv tann størsti parturin fer til Danmarkar, men tá tað kemur til charter túrar, er Bulgaria absolut heitasta navnið**

FERÐING

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Á Faroe Travel í Havn og í Fonn flog í Klaksvík hava tey í hesum døgum úr at gera. Føroyingar vilja nevniliga sleppa at ferðast, og tað skal vera uttanlands. Bæði í Havn og í Klaksvík siga tey, at at um summarið er bróðurparturin av ferðaseðlunum til Danmarkar.

– Vit selja sjálvandi nógvar ferðir suðureftir eisini, men tað vísir seg, at um veðrið er gott í Danmark, so vilja fólk gjarna sleppa niður. Ofta vísir tað seg, at tey heldur velja at fara suðureftir um heystið og veturin. Tá er talið av chartertúrum ógvuliga høgt, siga tey.

Tey greiða bæði frá, at veðrið hevur eina stóra ávirkan á føroyingar og ferðavanarnar. Men tað tykist tó vera púra ymiskt hvat tað er fyri veður, sum ávirkar.

Í Havn siga tey, at tað eru nógv, ið fara suðureftir til sólina, um veðrið er ringt herheima og í Danmark. Tá summarmjørkin liggur tungur yvir Havnini, vilja fólk sleppa avstað. Í Klaksvík verður sagt, at tey ikki hava henda tunga mjørkan, sum liggur alt summarið. Har er tað tvørturímóti tá sólin skínur, at fólk fara at brellast eftir syðri horisontum. Í báðum førum er tað tá er Bulgaria, sum fyri nøkrum árum blómaði sum ferðamál, ið veruliga er heita navnið.

– Bæði Bulgaria og Turkaland eru sera væl umtókt, tá tað kemur til charter túrar. Og tað eru bæði familjur og ungfólk í bólkum, sum fara avstað. Men summi vilja heldur til Mallorca og Rhodos, har tey hava verið fyrr. Tað kennist so deiliga trygt fyri summi at koma aftur til kendar umstøður ár eftir ár. Tað er smag og behag. Summi vilja jú eisini royna nakað nýtt hvørt summar, og ynskja ikki at fara aftur higar, sum tey longu hava verið.

### Ung Rejs túrarnir

Tá ferðastovurnar verða spurdar um UNG REJS ferðirnar, ið hava verið nógv umtalaðar og viðgjørdar, eru svarini eins.

– Nei, tað verður ikki so nógv bílagt av teimum ferðunum. Tað er okkurt, men tað er sum so einki at tosa um, greiða tey frá.

Á Faroe Travel siga tey, at tey undanfarin ár hava selt nógvar UNG REJS ferðir, men at talið er dalað markant í ár. Grundgevingin kann vera, at hetta slagið av ferðum, ið er fyri ungdóm ímillum 16-26 ár, hevur fingið ringa umtalu. Serliga var tað ein blaðgrein í fjør, ið var negativ um hesar ferðirnar. So tað kann vera, at foreldrini heilt einfalt ikki vilja loyva børnunum avstað. Tað eru nevniliga fyriskipaðir túrar, ið seta fokus á ungdóms- og náttarlív, og tað sigst ganga hart fyri seg.

Í Klaksvík verður sagt, at minkandi áhugin fyri hesum ungdómsferðunum kanska skyldast, at føroyskir ungdómar heldur ynskja at slappa av og taka tað róligt í frítíðini, heldur enn at fylgja einum strømmum skema, ið koyrir við fullari ferð allatíðina.

Báðar ferðaskrivstovur siga, at tey ferðandi sum heild eru javnt býtt ímillum aldursbólkarnar. Bæði pensjonistar, familjur við smáum børnum og ung fólk fara avstað um summarið. Og talið av seldum ferðaseðlum bara veksur ár um ár.

– Tey siga, at tíðirnar fara at gerast verri nú, men tað merkja vit einki til. Fólk ferðast akkurát tað sama, kanska enntá eitt sindur meir. Tað kann vera, at tey vilja fara áðrenn ringu tíðirnar koma, tað veit eg ikki, men vit merkja so einki til tað í ár, verður sagt á Faroe Travel.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Toftadungin grætur

**Perfektionisturin, maðurin, pápin, abbin og gubbin Edvin Strøm – látin!
76 ár – grækarismessudag 2004**



*Edvin í miðjuni millum Kristian á Bakka og Thomas Winther inni hjá Brattaberg. Hatta var »Landsliðið á Nesi« í 1972, vegarbeiði úti á Nesi, vegurin Vág – Hov*

So fóru tvær býarmyndir uppá 14 dagar. Tveir, sum høvdu sína dagligu gongd, í ringum sum í góðum tíðum, oman á keiina. Fyrst var tað Niels hjá Bergtóru, Niels Djurhuus – 81 ár, og so nú Edvin Strøm, tann sprelllivandi Edvin í sínari grønu ulpu, tann seinasta av sínum slag, sum vit burdu varðveitt í Undirhúsinum.

Fyri 40 árum síðani komu tveir ungir menn inn til okkum, eg var júst komin úr Føringahavnini, og spurdu eftir mær, tí teir høvdu hoyrt, at eg hevði plátur heim við Hank Snow, countrysangara. Tær máttu teir lána fyri alt í verðini og sleppa at spæla umaftur og umaftur. Menninir vóru Harry og Edvin Strøm, báðir ordulígir countryfjepparar. Sjálvandi var man stoltur av at sleppa at læna tveimum so tilkomnum monnum henda fína tónleik, ella musikkin, sum tað tá æt.

Og Edvin bleiv ongantíð gamal nokk til at leggja hendan musikkin á hillina, nei verri enn so. Vit høvdu eina avtalu nú aftur á jóansøku í Vági í hesum mánaða, at vit skuldu sita í kjallaranum, – í hesum flotta rúmi, ið hann hevði riggað sær til fyri fleiri árum síðani, – og lurta eftir harmoniku- og countryslagarum, meðan Edvin spældi uppá skeiðirnar, sum liggja á borðinum og syrgja harra sín. Menn gakk, brádliga sjúkan forðaði hesum og vesturi í gamla kirkjugarði verður so ongin musikkur at hoyra. Seinastu jóansøku sótu vit til klokkan 06:30 og spældu so tað rungaði um Toftadunga, sum nú eisini syrgir sín meistara. Toftadungi er eitt satt prýði fyri bygdina, fantastiskt útsýni yvir minnisvarðaøkið. Og eitt tað seinasta verkið, Edvin gjørdi, var at fáa skeltið »Í Toftum« upp á Toftadunga, tá hann hoyrdi um øll gøtunøvnini, sum vórðu kunngjørd av býráðunum. Hann var skjótur, tí snarsintur var hann. »Her skal ongin gøta eita nakað, hetta er í Toftum, ferdugt«. Og skeltið stendur so flott har millum snóratræið og lítur niðan móti Toftum. Jú,jú, temparamentið var so sjarmerandi haldi eg, ofta stóð hart á millum okkum báðar, men líka so skjótt var alt jarðlagt og stilt í sama viðfangið, og endaði í skjellilátri.

Merkiligt, at ein so livandi maður – 76 ár, skal vera so deyður, sum Edvin nú er. Hann bleiv jú ongantíð gamal, so týttur og kvikur í replikkum, sum diskussiónum. Vinur var hann, tað skerst ikki burtur, altíð í full »vigørð«.

At hann misti allar sínar beiggjar – og var nú tann seinasti av brøðrunum – neiv hann, serliga teir tríggjar Arthur, Herluf og Kjartan, sum valla blivu 30 ár, tá tuberklarnir herjaðu í 40'unum og 50'unum. Men missin av bróðursynunum Martin og Kjartan tók honum virkuliga dygt, eg haldi hjartað fekk meira skaða av tí í seinastuni.

Sum tann perfektionisturin Edvin var, hevur hann, ella hevði hann, nú í seinastuni dygst niðri í gamla kirkjugarði ból, har allir beiggjarnir liggja, uttan Harry og Sjúrður, sum liggja grivnir yviri í Líðini. Hann ruddaði og reiddi og gyrdi, – skøvaðist fyri sítt egna ból, tí har niðri við sjóvarmálan á Kirkjukletti, har vildi hann liggja og megnaði at fáa tað klárt. Men at tað bleiv í ár, tað vardi hvørki hann ella Helenu ella nakran av okkum.

Tað er so nógv, man kundi sett saman um Edvin, nú nakað er fráliðið síðani Grækarismessu, og man hevur vant seg við tankan, at Edvin kemur ikki aftur á Toftadunga og í heimið hjá Helenu og honum, sum hann pussaði og passaði so væl. Hann segði eisini við Helenu, tá hon og døturnar vóru og vitjaðu hann á Landssjúkrahúsinum; »Farið tygør bara suður aftur – je komi suður í kistu«. So perfektur var gubbin!

Aftaná, at Edvin helt uppat við lastbilunum, sum skinu sum ellisakfør, bæði tann grøni, síðani tann reyði, fekk hann sær stuttleikabát – »Rádni« at navni, – so aftur at pussa har umborð og á 60 ára degnum fyri 16 árum síðani gjørdi hann av, at til Shetlands skuldi hann við hesum fræga farið. Alt bleiv pussað við brasso umborð, tí nógvar vóru glitrandi gávur til bátin og hann á 60 ára degnum. Men hann skuldi jú hava mann við sær og bleiv tað so eg. So vit hildu avstað saman við »Johannu TG 326« sum móðurskip á veg til Scalloway. Men hann kom av landsynningi, so »Rádni« brast nakað hart av og á, og til síðst fór at leka. Vit tættaðu, men onki hjálpti, og sum myndirnar vísa, so sleipaðu vit sum longst, inntil bert stavnurin var undan, tá bleiv endin kappaður og »Rádni« fór til botns beint vestanfyri Foula. Tá fullu mong tár. Men vit fingu ein fínan túr við »Johannu« í allari sorgini.

Sum sagt var Edvin á keiini hvønn dag, og at byrja við var tað Eddie, abbasonurin, hann leiddi har niðri, síðani bleiv tað Steinar og seinast Helena, abbadótturin, sum átti tørn. Nú eru teir túrarnir niðurlagdir fyri well! 3 varðar hevur Edvin í hvussu er sett eftir seg. Fyrst er tað Toftadungin, har hann staðfestið forna navnið »Í Toftum«, sum hann so vakurt setti upp herfyri, sum áður nevnt. So er tað flotta Undirhúsið, sum stendur sum ein klenodia við síðuna av »Royndini Fríðu« og Nólsoyar Páll. Jú, vit koma at minnast hesar við takksemi til Edvin Strøm. Nú er tað bara tað - hvør kemur at passa Toftadungan? Verður tað Seyvar ella Steinar ella Helena – ja, tað fáa vit at síggja, men viðlíka má tað haldast í Edvin'sa ond.

Við tøkk fyri góð gomul minnir, og við friði yvir títt minni og við samkenslu til tykkum øll, sum hava mist, sendi eg hesa seinastu heilsu til vinin Edvin Strøm.

***PeDaNo***



Poul Guttesen, Tórshavn:

## Fyrsti glarmeistarin sum hevur lært í Føroyum

Poul Guttesen í Havn hevur sum tann fyrsti tikið útbúgving sum glarmeistari í Føroyum. Á glarmeistarskúlanum í Holbæk, har Poul gjørdi sveinastykkið, fekk hann bronsu, sum var tann besti karakterurin, sum varð givin

Poul er 44 ára gamal og havnarmaður. Hann hevur arbeitt á Føroya Termovirkið við Sundsvegin síðan 1981.

Hjá teimum sum higartil hava lært til glarmeistara, hevur bæði skúli og starvsvenjing gingið fyri seg í Danmark.

Tá Føroya Termovirkið bleiv góðkent sum lærupláss, fór Poul í 2001 í læru sum glarmeistari. Lærutíðin var trý og eitt hálvt ár. Í hesum tíðarskeiði hevur hann fimm ferðir verið á glarmeistaraskúlanum í Holbæk. Skúlin er tann einasti av sínum slagi í Danmark.

Á glarmeistarskúlanum í Holbæk gjørdi Poul sveinastykkið. Hann fekk bronsu, sum er tann besti karakterurin sum bleiv givin. Seinast ein næmingur fekk bronsu var í 2000.

Sum glarmeistari kann hann gera alt glasarbeiði innan øll øki, so sum glasveggir, fasadur, innramming og bilrútar ella havt tað skal vera.

Lærumeistari var Andrias Ziska.

## Tøkk

Eg vil á henda hátt takka øllum tykkum, sum gleddu meg við blómum, telegrammum, telefonsamrøðum, vitjan og øðrum á 90 ára føðingardegi mínum 17. juni 2004.

Vinarliga heilsur
**Hentze Joensen, Vágur**

### Dagurin

**25. juni. Prosper**. Halgimenni úr Fraklandi, sum teir annars vita lítið um at siga uttan tað, at hann var høgt mettur kirkjutænari í fornkirkjuni og doyði í 455.